4,68 í eftirmeting | Um 95,5% standa royndirnar



# PRINCE2® Foundation

Eitt grundarlag til at stýra einari verkætlan eftir PRINCE2®-leistinum.

Fá førleikaranar til at fullføra væleydnaðar verkætlanir við høgari góðsku til tíðina og innan fyri fíggjarætlanina við einari PRINCE2® Foundation sertifisering.

## Hetta fert tú at læra um ...

- Prinsippini og prosessirnar handan effektiva verkætlanarleiðslu.
- Temaini, sum sermerkja verkætlanina allan vegin ígjøgnum.
- Tín leiklut sum verkætlanarleiðari, og hvussu tú stýrir einari verkætlan við PRINCE2-háttinum.
- Hvussu tú miðvíst og effektivt planleggur, skipar og stýrir verkætlanum.

## Fortreytir

Tær nýtist ikki at hava tikið onnur skeið fyri at byrja upp á PRINCE2 Foundation.

## Hvønn vendir hetta skeiðið sær til?

Sama um tú hevur nógv ára royndir við verkætlanarleiðslu ella als ongar royndir, kanst tú taka hetta skeiðið. Eitt PRINCE2-skeið er viðkomandi fyri øll, sum arbeiða við verkætlanarleiðslu, og sum vilja betra um sínar førleikar.

## Lýsing av PRINCE2® Foundation

Ástøðið handan PRINCE2-háttin er grundað á verkætlanir í túsundatali, har verkætlanarleiðarar og onnur, sum nýta háttin, hava givið sítt íkast. Fyritøkur og felagsskapir, sum nýta háttin, tryggja, at allir luttakarar í einstøku verkætlanini tosa sama mál, skilja leiklutirnar og ábyrgdina hjá hvørjum øðrum og nýta sama leistin til at fullføra verkætlanina á bestan hátt. Hetta økir møguleikan fyri einum góðum úrsliti av verkætlanini, og tað endaliga úrslitið verður eisini munandi betri. Tá tú hevur staðið skeiðið, fært tú eina PRINCE2 Foundation-sertifisering, sum er eitt altjóða viðurkent prógv, sum tú kanst nýta í øllum heiminum at prógva tínar førleikar innan verkætlanarleiðslu.

## Endamálið við skeiðinum

Tú tú hevur lokið hetta PRINCE2-skeiðið, hevur tú fingið røttu amboðini at fullføra tína verkætlan – uttan mun til slag og stødd. Tú fert at skilja prinsippini og prosessirnar handan góða verkætlanarleiðslu, og tú fert at læra at handfara tey temaini, sum vísa seg av á í allari verkætlanargongdini. Tá skeiðið er liðugt, hevur tú lært, hvussu tú stýrir

einari verkætlan við PRINCE2-háttinum – ein effektivur háttur at tryggja, at allir luttakarar nýta sama leistin, og hava somu uppfatan av verkætlanararbeiðinum.

## Undirvísingargongd

Skeiðið er sjálvlestur við e-learning frá video. Tú stroymir tína undirvísing har tú vilt, tá tað liggur fyri, og ferðina stýrir tú sjálv/ur. Samansetingin av sjónfílum, quiz, royndarpróvtøkum og eyka tilfari stuðlar tær væl bæði á skeiðinum og aftaná. Mentorix International bjóðar leypandi webinar, har luttøkan er ókeypis, meðan tú ert undir útbúgving. Synergi er samstarvsfelagi hjá Mentorix í Føroyum.

## Um undirvísaran

Kenny Munck, Akkrediteraður undirvísari í PRINCE2®, MSP®, MoP® o.ø.

enny hevur tikið lut í nógvum ymiskum verkætlanum og á at kalla øllum stigum frá toymisleiðara, verkætlanarleiðara og programmleiðara til at vera limur í stýribólkum og programmnevndum.

Hann er kendur fyri at vera ein livandi og kveikjandi framløguhaldari, sum fær luttakararnar at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar.

Undirvísir millum annað í PRINCE2®, MSP®, MoP®, P3O® og MoR®.

## Íroknað

- 5 tíma sjónfílur
- 159 eyka tilfar
- 40 royndir
- 25-30 tíma mett lestrartíð
- 12 mánaða atgeingi umvegis teldu, teldil og fartelefon
- Online próvtøka
- Almenn PRINCE2-vegleiðing
- Prógv upp á tína sertifisering
- Trygd fyri, at skeiðið verður hildið (online skeið)
- Ókeypis re-take próvtøka

## Sí alt um skeiðsinnihaldið á niðanfyristandandi síðum.

Hevur tú spurningar um skeiðið, ert tú altíð vælkomin at venda tær til okkara.

Vinarliga Synergi

Ása Andreasen 227464 | asa@synergi.fo

# Skeiðsinnihald: PRINCE2® Foundation

## Um PRINCE2® Foundation

### Hvat er PRINCE2? | 1 sjónfíla – 7 min.

PRINCE2 er stytting fyri PRojects IN Controlled Environments og er eitt av heimsins kendastu háttaløgum innan verkætlanarleiðslu. Tað er ein skipaður verkætlanarháttur, sum tekur støði í royndum og íkastum frá fleiri túsund verkætlanum. PRINCE2-hátturin er mentur til at vera yvirskipaður, so hann kann nýtast í øllum verkætlanum, uttan mun til stødd, slag, fyriskipan, landafrøðiliga staðseting og mentan.

## Verkætlanarleiðsla við PRINCE2® Foundation

### Lær at stýra einari verkætlan við PRINCE2 | 1 sjónfíla – 10 min.

Eitt av endamálunum við PRINCE2 Foundation er at geva atgongd til røttu upplýsingarnar í rættari løtu, so røttu fólkini kunnu taka røttu avgerðirnar um verkætlanina. Tað kann millum annað vera avgerðir, sum optimera gerðir ella íverksetanina av tiltøkum, sum gera sítt til at betra um avrikið.

## PRINCE2® Prinsipp

### PRINCE2 prinsippini | 1 sjónfíla – 5 min.

Tað eru sjey prinsipp innan PRINCE2 Foundation. Ein verkætlan er einans ein PRINCE2-verkætlan, um øll sjey prinsippini eru í nýtslu. PRINCE2-prinsippini eru tær leiðreglurnar og tann siðvenjan, sum gera av, um ein verkætlan verður stýrd í sambært PRINCE2-háttinum. Eftirsum PRINCE2 er ein smidligur háttur til verkætlanarleiðslu, er eitt av prinsippunum, at hann skal tillagast, so hann hóskar til stødd og slag av verkætlan. Á okkara PRINCE2 Foundation-skeiði fert tú at læra meira um, hvussu hátturin kann tillagast, so hann kann nýtast til júst tína verkætlan.

# Tillaging og íverksetan av PRINCE2®

### PRINCE2-hátturin | 3 sjónfílur – 12 min.

PRINCE2-hátturin er sniðgivin, so hann kann lagast til eina og hvørja verkætlan. Hátturin er so, at tað ber til at tillaga slag og støðd á verkætlan uttan at leggja nakran part burturúr. Um tú leggur burturúr einstakar partar av háttinum, hevur tað við sær, at stýringin viknar fyri alla verkætlanina, og tí skulu allir partar av háttinum nýtast í verkætlanini. Skalt tú gera tillagingar, skalt tú nýta háttin rætt, so tú tryggjar rætta stigið av governance, planlegging og eftirliti í samsvari við prinsippunum í PRINCE2 Foundation.

Hesar lyklahendingar skulu vera við, tá PRINCE2 skal setast í verk í einari fyriskipan:

- Tillaging av PRINCE2 fyri at seta í verk serstaka verkætlanarháttin hjá einstøku fyriskipanini
- Innseting av tillagaða háttinum við at tryggja, at starvsfólkini í fyriskipanini skilja háttin og nýta hann rætt.

# PRINCE2® Tema

### PRINCE2 tema | 29 sjónfílur – 135 min.

Tað eru sjey tema í PRINCE2 Foundation, sum lýsa tær síðurnar av verkætlanarleiðslu, sum skulu handfarast leypandi og javngongt í allari verkætlanini. Temaini lýsa serstakliga ta viðgerðina, sum PRINCE2 krevur í sambandi við ymisku partarnar í verkætlanarleiðslu, og hví teir eru neyðugir.

# PRINCE2-prosessirnar

### PRINCE2 processir | 23 sjónfílur – 106 min.

Í PRINCE2-háttinum finnast eisini sjey prosessir, sum lýsa alla gongdina frá byrjan til enda. Her fært tú innlit í, hvussu verkætlanin skal ganga fyri seg, líka frá byrjan yvir næstu stigini í verkætlanargongdini og til endan av verkætlanini. Hvør prosessin hevur tjekklistar við viðmæltum aktivitetum, úrslitum og ábyrgdarøkjum, sum tú kanst stuðla teg upp at.

# At hugsa um í sambandi við organisatoriskari íverkseting

## Set í verk PRINCE2

Á okkara PRINCE2 Foundation-skeiði fært tú eina útgreinaða vegleiðing til, hvussu tú kann seta í verk PRINCE2-háttin í fyritøkum og felagsskapum. Tú kemur eisini at læra, hvat tað hevur týdning at hugsa um, tá PRINCE2 skal tillagast, tá hátturin hjá fyriskipanini verður settur upp. Harafturat fert tú at skilja, hvussu tú innbyggir tillagaða háttin í arbeiðsgongdirnar í fyriskipanini og tryggjar, at hann verður nýttur.

# Venjingar

Aftan á hvørja undirvísing er ein miniquiz, sum hevur til endamáls at tryggja, at tú hevur fingið við ta neyðugu vitanina um evnið. Vit viðmæla, at tú roynir allar quiz'irnar á skeiðinum, tí tú kanst nýta tær sum próvtøkuvenjing. Tú sært tína menning undir "Statistik". At enda fært tú eina praktiska roynd, sum tú skalt standa fyri at fáa tína sertifisering innan PRINCE2 Foundation.

# PRINCE2® Foundation-próvtøka

## Ament um PRINCE2® Foundation-próvtøkuna

- 1 tíma multiple choice-próvtøka
- 60 spurningar
- Tú stendur próvtøkuna við 35 røttum svarum
- Um tú tekur próvtøkuna á einum øðrum máli enn tínum móðurmáli, fært tú 25 % eyka tíð

## Tekning

Tá tú ert til reiðar til próvtøkuna, skalt tú bara senda ein teldupost til synergi@synergi.fo við hesum upplýsingum:

- Navn
- Teldupostur
- Hvørja sertifisering og hvat mál ynskir tú (t.d. PRINCE2 Foundation – DK)>
- Møguligar viðmerkingar – til dømis orðblindi

Innan 2 gerandisdagar fært tú ein teldupost frá kursus@mentorix.dk, og síðani ein teldupost frá próvtøkuveitaranum PeopleCert, har tú fært víðari vegleiðing.

G.G.! Teldupostar frá PeopleCert kunnu enda í spamm ella óynsktum telduposti, so minst til at kanna allar teldupostkassar.

## Atgeingilig mál

PRINCE2 Foundation-próvtøkan kann takast á donskum og enskum.

## Krøv til at velja online próvtøku

- Vevmyndatól (hav við tær ein spegil, um tú hevur innbygt vevmyndatól, tí rúmið verður kannað, áðrenn próvtøkan byrjar)
- Mikrofon
- Møguleiki fyri at sita einsamøll/allur í einum rúmi alla próvtøkuna. Tað ber til at taka próvtøkuna í hølunum hjá Synergi eftir avtalu.
- At tú hevur eitt samleikaprógv við mynd (pass, koyrikort ella annað samleikaprógv við mynd og føðingardegi)

## Hvussu gongur próvtøkan fyri seg?

Samstarvsfelagin hjá okkum bjóðar eina online próvtøku, og tað merkir, at próvtøkan hevur online eftiransing av einum WebProctor. Tá tú hevur bílagt, fært tú ein teldupost við tínum **próvtøkuvoucher** frá PeopleCert.

Í teldupostinum er eitt leinki til at stovna eina kandidatvangamynd hjá PeopleCert, ein voucherkoda og ein viðheft vegleiðing. Tað hevur stóran týdning, at tú lesur vegleiðingina, áðrenn tú bíleggur tína próvtøku.

Ein próvtøkuvoucher gevur atgongd til *eina* próvtøku. Eingin endurpróvtøka er íroknað. Tú hevur sjálv/ur ábyrgd av próvtøkuni, men samstundis er tað ein smidlig loysn fyri fólk, sum hava nógv á skránni.

Próvtøkan er í samstarvi við grikska próvtøkufelagið PeopleCert. Tey hava alla ábyrgdina av support í sambandi við hesari próvtøkuni.

## PeopleCert

Telefon: +45 43 31 49 67
(Gev gætur, at tey tosa enskt, hóast telefonnummarið er danskt)

Teldupostur: customerservice@peoplecert.org

Tá tú hevur bílagt ein voucher, kanst tú ikki lata hann inn aftur, tí hann er keyptur júst til tín.

Í teldupostinum frá PeopleCert stendur, nær tín voucher gongur út. Tín voucher kan ikki nýtast aftan á ta dagfestingina – sama um tú hevur eina góða orsøk til ikki at hava nýtt voucher'an. Vit viðmæla, at tú bíleggur tína próvtøku umleið 14 dagar áðrenn tú ætlar til próvtøku, og at tú tekur próvtøkuna 30 dagar, áðrenn voucher'in gongur út.

Tøkniliga gongur sjálv próvtøkan fyri seg á donskum, uttan so at tú hevur biðið um eitt annað mál. Ein enskttalandi WebProctor er próvtøkuvakt. Tú kanst tosa og/ella kjatta við WebProctor áðrenn próvtøkuna, meðan próvtøkan er og aftan á próvtøkuna. Tú mást undir ongum umstøðum verða órógvað/ur, meðan próvtøkan er. Í tíðarskeiðinum, meðan próvtøkan er, kann eingin annar vera til staðar, stinga høvdið inn, ringja til tín o.s.fr. Tú skalt eisini syrgja fyri, at eingin tilvísing er nakrastaðni í rúminum til PRINCE2, verkætlanarleiðslu ella annað (t.d. uppsløg og myndir).

## Re-take hjá Synergi

Hjá Synergi leggja vit stóran dent á, at tú fært sum mest burturúr, og mest møguliga læring og vitan, tá tú tekur okkara online-skeið.

Vit hugsa nógv um góðsku og vilja altíð, at skeiðsluttakararnir umframt at fáa ítøkiliga vitan eisini standa próvtøkuna og fáa sertifisering. Tí bjóða vit tær tvær próvtøkuroyndir.

## Nógv fyrireikingartíð til roynd nr. 2

Næsta royndin hjá tær skal bara vera í seinasta lagi 6 mánaðir aftan á fyrstu royndina.

Próvtøkan kann takast í hølunum hjá Synergi, eftir nærri avtalu.

## Spurningar ella ivamál?

So ring ella skriva endliga til okkara.

Vinarliga
Synergi

Ása Andreasen 227464 | asa@synergi.fo